# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## E og B vinna helst fólkatingsvalið

So fór føroyska fólkatingsvalstríðið í gongd. Fyrst á Rás 2 fríggjakvøldið og so í Kringvarpinum sunnudagin. Hyggja vit eftir veljarakanningunum standa Tjóðveldi og Samband til at vinna. Høgni Hoydal situr rættiliga tryggur í sessinum, meðan Fólkaflokkurin má rokna við at missa mannin, nú Anfinnur Kallsberg ikki stillar upp aftur. Flokkurin stendur so niðarliga í veljarakanningunum, at tað má takast sum givið, at hann missir fólkatingsmannin. Neyvan fer nýggi formaðurin at megna at lyfta uppgávuna eftir Kallsberg. Javnaðarflokkurin fer neyvan at røkka einum av umboðunum, um vit somuleiðis hyggja eftir veljarakanningunum. Ein skuldi annars trúð, at formaðurin í Javnaðarflokkinum hevði kunnað fingið atkvøður uppá løgmanseffektina, men tað fer neyvan at vera nóg mikið til at heinta Høgna Hoydal og hvør veit, Magna Laksafoss aftur.

Kappingin í Sambandsflokkinum fer uttan iva at standa millum Magna Laksafoss, Kei Leo Johannesen og Edmund Joensen. Tá hugsað verður um, hvussu nógv Laksafoss hevur profilerað seg og at fólk kanska vilja síggja nýggj andlit, er ikki óhugsandi, at tað verður hann, ið vinnur sessin. Sambandsfólk hava so eisini her møguleikan at marknaðarføra ein møguliga nýggjan leiðara í flokkinum, nú tað ikki er nakað dulsmál, at ikki øll eru so fegin um verandi formannin. Um fyrrverandi formaðurin og verandi tingformaður hevur møguleika at gera seg galdandi er ilt at siga. Hann hevur helst fingið bæði stuðlar og mótstøðufólk eftir uppskotið um eitt valdømi. Hinvegin man hann eiga mangar stuðlar kring landið alt eftir at hava verið so leingi í politikki, eitt nú sum løgmaður og eitt skifti eisini á fólkatingi.

Hvat viðvíkur Tjóðveldi, so er eingin ivi um, at Høgni Hoydal fær flestar atkvøður. Hansara seinasta útspæl kann tó geva honum ávísar trupulleikar. Uttan iva vilja mong trúgv tjóðveldisfólk kenna tað, at Hoydal við síni kúvending at stuðla ta stjórn, sum vil gagna áhugamálunum hjá Tjóðveldi og Føroyum mest, sum nakað, ið brýtur við gomul tjóðveldissjónarmið um at halda seg uttan fyri danskan politikk. Kann eisini vera at mong av teimum ungu í flokkinum kortini fara at halda hetta vera snilt og rætt. At tingini standa ikki í stað. Tí tá man kortini er valdur á fólkating so ræður um at brúka tað vald man hevur har. Um komandi vika kann broyta støðuna hjá fólki er so upp til einstøku valevnini. Fyri formann Javnaðarfloksins og løgmann kann eitt vánaligt fólkatingsval koma sera illa við til løgtingsvalið. Og øvugt, eitt gott val nú kann fáa stóran týdning fyri løgtingsvalið. Nú veldst so um, hvussu væl telvað verður ella hvør situr við bestu trumfunum.

**Sosialurin**

## Viðmerking til útsøgn hjá Dánjali Petersen evangelisti í Mentanartíðindum fríggjakvøldið 26. oktober

**Í kjakinum um leikin "Fundamentalisturin" í Mentanartíðindum fríggjakvøldið 26. oktober úttalaði Dánjal Petersen evangelistur seg á ein so óhepnan hátt um ættleiðing, at hetta ikki kann fara framvið uttan viðmerking**

".....So sigur Ættleiðingarfelagið nú her fyri, at børnini eru farin uppum 100.000. Hatta er eitt grúiligt skil. Samstundis er tað 6o føroyingar, sum verða dripin úti á hospitalinum, hvar eg sigi góðasti hví gera vit soleiðis? Hví taka vit ikki og føða hasar føroyingarnar sum blíva 60 í tali og kanska selt teir víðari fyri eini 60.000 pr. stykk. Hattar ljóðar sum menniskjahandil, men tað er ikki tað vit vilja, absolut ikki, so koma 3,6 milliónir inn í heilsusystemið hjá okkum".

Ættleiðingarfelagið tekur frástøðu frá slíkum hugsunarhátti. Felagið er ikki áhugað í at fara inn í eitt alment kjak um føroysku forsturtøkulóggávuna, men felagið loyvir sær at minna á, at ættleiðing einki hevur at gera við keyp og sølu av børnum. Felagið vil minna Dánjal Petersen og øll onnur, sum hava somu áskoðan á, at tað IKKI eru børnini sum eru farin upp um 100.000 kr. Ættleiddu børnini eru púra ókeypis. Ein ómetalig gáva og álitisváttan frá gevaralandinum, sum velur at geva teimum ein nýggjan møguleika fyri virðiligum lívi.

At ein vaksin maður fyri opnari mikrofon byrjar at tosa um fíggjarligar fyrimunir fyri landskassan um søla av nýføddum føroyingum var ein møguleiki er óvirðiligt fyri hann og ólukkuligt fyri ættleidd og ættleiðingarfamiljur. Dánjal Petersen tyktist hava gloymt, at menniskjahandil er forbjóðaður í øllum framkomnum londum.

Løgfrøðiliga- og umsitingarliga arbeiðið, sum er neyðugt skal ein ættleiðing fara fram á lógligan, tryggan og virðiligan hátt, er umfatandi og kostnaðarmikið. Harumframt koma aðrar útreiðslur, sum gera at ættleiðing kann vera ein fíggjarlig byrða, sum er ov tung hjá nøkrum familjum at fara undir. Við øktum fíggjarligum stuðli kundi verði lætt munandi um byrðuna so at enn fleiri føroyskar familjur frameftir fingu høvi at gerast heilar á hendan hátt.

**Vinarliga**
**Ættleiðingarfelagið**

## Viðmerking til Zakarias Wang

**BJARTI MOHR**

Abbasonur Kjartans



Zakaris skrivar um spurningin við at telja atkvøðurnar upp á einum staði til komandi Løgtingsval. Alt gott um tað.

Men so hevur hann eina heldur løgna søgu um Kjartan Mohr og vegin til Kaldbaks. Vit sum minnast Kjartan vita, at hann kundi siga mangt og hvat eins og allir aðrir politikarar. Eg skal heilsa Zakarias og minna hann á, at tað er ikki vanligt í Føroyum at leggja eftir deyðum monnum. Fólk eiga at hava frið undir grønutorvu – samdur ella ikki samdur við tey.

Tá ið nú Kjartan ikki kann svara fyri seg sjálvan, so skal eg gera tað.

Annars eru avrikini hjá Kjartani her á fold fult á hædd við tey hjá Zakaris Wang.

## Píkar? - Koyr á bøin!

**JÁKUP E. JENSEN**

Følsk reklama?

Nú kom hálkan. Endiliga fyri nógv. Nógv hava skøtt teirra bilar við hesum sokallaðu píkadekkunum fyri fleiri vikum síðan og endiliga sleppa tey at royna tey.

Men hvat er hatta fyri nakað???

Tey standa og spola og grava vegirnar upp. Dekkini rigga ógvuliga illa í svartakálki, sum sæst.

Gomlu vetrardekkini hjá mær rigga nógv betur, men tað eru eisini góð og heldur dýr dekk. Ikki vetrardekk úr londum, sum ongantíð hava sæð kava. Ikki við píkum í. Ikki fyri umleið 400 kr stykki.

Kvalitetur kostar. Sí testir gjørdar av FDM ella týska ADAC!!

Kæru medferðandi!

Keypið góð vetrardekk heldur enn píkadekk. So sleppa vit kanska undan øllum hesum hálkuóhappunum og tey, sum eisini ganga í ferðsluni, sleppa undan øllum støvinum, sum píkarnir grava upp.

Eg havi hoyrt, at fleiri fólk doyggja av hesum støvi, enn fólk doyggja í ferðsluni. Hvat er so vunnið? Eg veit ikki um tað er rætt, men eg velji at trúgva tí, heldur enna at trúgva upp á píkadekk.

Góðan og tryggan vetur, øll somul.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.